# Ársfrásøgn 2011

## Annual Report 2011

TRYGD

# Innihaldsyvirlit / Contents


**Leiðslufrágreiðing 2011** ............................................. 4
Management's report 2011 ........................................... 10

**Nýttur roknskaparháttur** ........................................... 16
Accounting policies ....................................................... 18

**Nevnd og stjórn**
Board of directors and management ............................. 20

**Gongdin seinastu 5 árini**
5-year financial highlights .............................................. 22

**Rakstrarúrslit**
Income statement ........................................................... 23

**Fíggjarstøða**
Balance ........................................................................... 24

**Viðmerkingar til ársfrásøgnina**
Notes to financial statements ........................................ 26

**Leiðsluátekning**
Statement by the management ...................................... 34

**Grannskoðaraátekningar**
Auditors report .............................................................. 35
Independant auditor´s report ....................................... 36

# Leiðslufrágreiðing fyri 2011

Trygd er eitt skaðatryggingarfelag við virksemi í Føroyum.

Felagið veitir nærum øll sløg av skaðatryggingum til húsarhald og privatpersónar og vinnuligt virksemi. Undantak er tó sjóvátryggingar til størri skip, sum Trygd ikki hevur veitt síðan januar 2009.

Árið 2011 var heldur óvanligt fyri Trygd og úrslitið verður í útgangsstøðinum ikki mett sum nøktandi. Orsakað av óvanliga ógvusligu ódnunum í vetur, hevði felagið nógv fleiri skaðafráboðanir í 2011 samanborið við 2010. Tað sama er galdandi fyri skaðaendurgjøldini, ið eisini vóru væl størri í 2011 enn í 2010.

Hóast tríggir teir fyrstu ársfjórðingarnir vóru góðir, hava skaðafráboðanirnar sostatt verið væl fleiri enn vænta og, samanborið við undanfarnu tveimum árunum, hava tað verið nógvir og stórir skaðar, sum hava sermerkt árið 2011.

Trygd hevði 4,6 mió. kr. í yvirskoti fyri skatt í 2011. Í 2010 var úrslitið 20,4 mió. kr. fyri skatt.

Ársúrslitið eftir skatt er 3,7 mió. kr. í 2011. Tað var 16,8 mió. kr. í 2010.

Bruttoinntøkurnar frá tryggingargjøldum lækkaðu 0,3 mió. kr. í 2011 og vóru tilsamans 85,8 mió. kr. Lækkingin er sløk 0,4 prosent. Lækkingin stavar einamest frá lægri gjøldum frá akfarstryggingum. Inntøkurnar frá tryggingargjøldum fyri egna rokning lækkaðu 1,3 mió. kr. Henda lækkingin er 1,6 prosent samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Skaðaendurgjøldini í 2011 eru sum sagt grundaðar á tríggjar góðar ársfjórðingar og ein sera ringan fjórða ársfjórðing frá oktober til desember.

Serliga vóru tað stormarnir 24. november og 25. desember, sum gjørdu um seg. 24. november herjaði herviligasta ódnin í Føroyum síðani 1988 og fekk hetta eisini sera stóra ávirkan á úrslitið hjá Trygd.

31.12.2011 vóru samlaðu skaðaendurgjøldini fyri ódnina 24. november skrásett at vera 19,6 mió. kr. Talið kann framvegis hækka nakað, so hvørt sum skaðarnir verða liðugt umvældir.

Somuleiðis vóru skaðaendurgjøldini fyri ódnina Jóladag skrásett at vera 3,8 mió. kr. við ársenda.

Tilsamans vóru skaðaendurgjøldini fyri egna rokning 62,7 mió. kr. í 2011. Til samanberingar vóru somu útreiðslur 47,1 mió. kr. í 2010.

Skaðaprosentparturin, ið er 78,4, verður eisini hildin at vera ov høgur. Í 2010 var skaðaprosentparturin 59,4.

Endurgjaldsburturleggingarnar fyri egna rokning vóru 58,4 mió. kr. við ársenda 2011. Hetta var 30,3 mió. kr. fleiri enn við ársenda 2010, tá endurgjaldsburturleggingarnar vóru 28,1 mio. kr.

Hækkingin er eitt beinleiðis úrslit av ódnunum í vetur.

Tryggingartekniska úrslitið varð 1,8 mió. kr. í 2011 samanborið við 17,2 mió. kr. í 2010.



Tryggingartekniska úrslitið gjørdist sostatt munandi verri enn undanfarna ár, men tá havt verður í huga stóru skaðarnar og nógvu og stóru skaðaendurgjøldini orsakað av ódnunum í vetur, er felagið fegið um, at tað eydnaðist at koma ígjøgnum roknskaparárið við yvirskotið.

2011 førdi broytingar við sær í stjórnini á Trygd. Jean Djurhuus, sum hevði røkt starvið síðani februar 2008, segði seg úr starvi sum stjóri 1. juni 2011. Janus Thomsen, sum hevði verið deildarleiðari í Trygd, bleiv settur sum konstitueraður stjóri og er hendan støðan óbroytt.

Í 2011 fór Trygd eisini undir fyrireikandi arbeiði í sambandi við nýggja KT skipan. Arbeiðið kemur at halda fram í 2012 og 2013, og kemur at føra øktar rakstrarkostnaðir við sær.

Orsakað av, at arbeiði við nýggju KT skipanini bleiv seinkað nakað, lækkaði rakstrarkostnaðurin samanborið við árið í fjør.

Rakstrarkostnaðurin verður hildin at vera á nøktandi stigi.

Móðurfelagið, BankNordik, keypti í vár sunnu partarnar í Amagerbanken og víðkaði harvið um bankavirksemi í Danmark. Keypið av Amagerbanken hevur ikki ávirkað Trygd stórvegis í tíðarskeiðinum.

Eisini keypti BankNordik tíðliga í summar helmingin av lívstryggingarfelagnum LÍV.

Keypið av helminginum av LÍV hevur heldur ikki ávirkað Trygd stórvegis.

Trygd hevur í høvuðsheitum somu endurtryggingarskrá fyri 2011, sum var galdandi í 2010.

Trygd hevur framvegis lutfalsligan stóran eginváða í síni endurtrygging.

Fíggjarligu inntøkurnar í 2011 vóru 3,7 mió. kr. móti 4,0 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Lægri rentustøði er høvuðsatvold til inntøkulækkingina. Felagið hevur ein varnan íløgupolitikk, sum merkir, at meginparturin av íløgufænum verður settur í lánsbrøv, og at restin verður sett í vanlig avtaluinnlán í banka. Ongar íløgur í partabrøv eru í 2011.

Skatturin av ársúrslitinum fyri 2011 verður roknaður til 0,8 mió. kr.

Tilsamans hevur Trygd rentað eginpening sín 4,3 prosent fyri árið 2011.

Leiðslan heldur ikki, at úrslitið er nøktandi.

## Marknaðurin

Harða kappingin millum veitararnar hevur eisini gjørt seg galdandi í 2011. Bæði hvat fulnaðum og prísum viðvíkja.

Á privatkundamarknaðinum hevur Trygd selt nakað meiri í ár samanborið við í fjør, tá talan er um nøgd av tryggingum. Tó ger harða trýstið á tryggingarkostnaðirnar, at vøksturin í fleiri førum ikki sæst aftur í tryggingargjøldunum.

Á vinnumarknaðinum arbeiðir Trygd miðvíst við at menna vinnuøkið og eru tøk aftur tikin í 2011. Felagið ger nógv burturúr at menna samskiftið við verandi kundar, umframt at stórur dentur verður lagdur á at fáa nýggjar kundar.

Felagið hevur sett sær fyri at vaksa á hesum øki komandi árini.

Tað verður framvegis lítið selt av sethúsum og nýggjum bilum í Føroyum samanborið við undanfarin ár.

Hóast glottar eru at hóma, er vøksturin lítil og varin.

Eins og undanfarnu tvey árini, var sølan av nýggjum bilum lág í 2011. Hetta ávirkar søluna av biltryggingum, tí tað er í keypsstøðuni, at viðskiftafólk standa við valinum, um hvar bilurin skal tryggjast. Harumframt gerast gomlu bilarnir eldri og verða mangan fluttir frá at vera bæði skrokk og ábyrgdartryggjaðir til einans at vera ábyrgdartryggjaðir. Hetta førir við sær lægri inntøkur til felagið.
Hóast hetta, hevur gongdin viðvíkjandi nøgdini av biltryggingum verið jalig í 2011.

Nógv er hent á skaðatryggingarmarknaðinum í Føroyum seinastu árini.

Fyri kappingina sum heild, kann nevnast, at tað í dag ber til hjá bæði donskum og íslendskum skaðatryggingarfeløgum at virka í Føroyum, umframt, at latið er upp fyri, at tryggingarmeklarar kunnu virka í Føroyum.

Hetta gagnar kappingini og í síðsta enda viðskiftafólkunum.

Hóast føroyski marknaðurin ikki hevur merkt nógv til donsku tryggingarfeløgini i Føroyum í 2011, hava íslendsk tryggingarfeløg gjørt seg galdandi á útvaldum økjum innan vinnutryggingar umvegis tryggingarmeklara í Føroyum.

## Menning felagsins

Trygd arbeiðir miðvíst við at menna og varðveita kappingarført tryggingarvirksemi. Felagið leggur stóran dent á at hava rakstrarútreiðslurnar á ráðiligum stigi, og at starvsfólkini alsamt verða ment og útbúgvin til at geva viðskiftafólkunum bestu ráðgeving og tænastu, ið kann vera við til at tryggja, at felagið hevur ein skynsaman vøkstur. Týdningarmikil partur av hugtaki okkara er, at viðskiftafólkini framhaldandi fara at hava álit á okkum, og at vit tryggja góða kapping á skaðatryggingarmarknaðinum, uttan at dygdin svíður fyri tað.
Leiðslan heldur, at Trygd stendur væl fyri á føroyska tryggingarmarknaðinum.

Í árinum 2011 vóru í miðal 24 fólk í fullum starvi í Trygd, móti tilsvarandi 24 starvsfólkum í 2010.

## Váðastýring

Váðastýring er ein umráðandi partur av virkseminum hjá Trygd. Tá ið kundar velja at tryggja seg hjá Trygd, gera teir hetta í tí trúgv, at Trygd stýrir sínum váða, soleiðis at felagið til eina og hvørja tíð er ført fyri at halda sínar skyldur.

Nevndin í Trygd stendur inni fyri, at felagið hevur eitt nøktandi fíggjarligt grundarlag, og hevur innanhýsis mannagongdir fyri váðaásetingar og váðastýring, soleiðis at tryggingarvirksemið fer fram á einum nøktandi fíggjarligum grundarlagi í mun til váðan.

Fyri at fylgja hesum krøvum verða politikkur og mannagongdir leypandi dagførd, samstundis sum útrokningar leggja fast innanhýsis kapitaltørvin.

Váðin hjá Trygd er grundaður á politikk, mannagongdir og váðaásetingar, sum regluliga verða dagførd og góðkend av nevnd felagsins.

## Tryggingarváði

Trygd eftirkannar leypandi tær innteknaðu tryggingarnar og endurmetir hesar í mun til inntekningar- og endurtryggingarpolitikk og ásettan kapitaltørv. Umframt tær leypandi eftirkanningarnar av lønseminum av teknaðum tryggingum verður framd ein leypandi meting av burturleggingum, sum skulu dekkað enn ikki fráboðaðar skaðahendingar, sum longu eru fevndar av innteknaðum tryggingum. Her inngongur somuleiðis ein meting av kreditt-váðanum í samband við ágóða fyri tryggingargjøld. Tryggingarteknisku avsetingarnar til at dekka framtíðar gjaldingar til fráboðaðar skaðar, verða framdar við gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum skaða, supplerað við gjøgnumgongd av søguligum hagtølum.

Endurtryggingarnar hjá Trygd mótsvara einum løgdum endurtryggingarpolitikki, sum tryggjar, at størri náttúrufyribrigdi og størri einkultskaðar ikki fara at forða Trygd í at halda sínar skyldir.

Fyri at minka um møguligan váða upp á endurtryggjarar nýtir Trygd bert endurtryggjarar, sum eru fíggjarliga væl grundaðir ella hava nøktandi altjóða rating.

## Íløguváði

Trygd hevur ein varnan íløgupolitikk.

Ein munandi partur av fíggjarligu ognunum hjá Trygd er settur í stats- og realkredittlánsbrøv, meðan restin er sett sum bankainnistandandi.

Felagið hevur ongar íløgur í partabrøvum.

Trygd hevur ongan gjaldoyraváða.

## Strategiskur váði

Tann strategiski váðin verður stýrdur við, at nevndin leypandi leggur karmar fyri tí strategiska arbeiðinum hjá leiðsluni, og at tað leypandi verður fylgt upp hesum viðvíkjandi. Partur av strategisku stýringini er at fylgja

væl við gongdini í umverðini, kappingarstøðuni og lóg-gávukarmunum.

## Rakstrarligur váði

Tann rakstrarligi (operationelli) váðin er vandin fyri beinleiðis og óbeinleiðis tapi stavandi frá óneyvum ella skeivum innanhýsis mannagongdum, starvsfólkum, skipanum ella uttanífrá komandi hendingum. Váðin fyri slíkum vandum inngongur eisini í útrokningunum av innanhýsis solvenstørvi felagsins.

Trygd fylgir neyvt teimum viðtiknu politikkunum og mannagongdunum, sum eisini fevna um IT-trygdar-fyriskipanir.

Vandin við innrokning og metingum eru fylgjandi:
Metingin av avsetingum upp á tryggingaravtalur, sum eru tær mest avgerandi roknskaparligu avbjóðingarnar, tí fleiri ótryggleikar kunnu verða knýttar at avsetingunum av hesum.

Skaðaavsetingar verða gjørdar við metingum av hvørjum einstøkum máli, eins og við hagfrøðisligum útrokningum yvir framtíðar gjøld og umsiting av endurgjaldsskyldum av somu málum.

Framskrivingarnar verða framdar við grundarlagi í staðfestum royndum hjá Trygd, hvat viðvíkur søguligu gongdini, gjaldsmynstri, tíð, sum gongur, til skaðin verður fráboðaður, tíðini til skaðaviðgerðina og øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava ávirkan á skaða-avsetingina í framtíðini.

Skaðaavsetingarnar eru íroknaðar eina avseting fyri skaðar, sum eru hendir, men enn ikki fráboðaðir (IBNR avsetingar).

Skaðaavsetingarnar fevna somuleiðis um beinleiðis og óbeinleiðis skaðaviðgerðarkostnaðir til at gera skaðar upp, sum eru íkomnir av umstøðum, sum eru hendar áðrenn roknskaparlok, men sum ikki eru fráboðaðar felagnum.

## Eginpeningur og gjaldføri felagsins

Tann 31. desember í 2011 var eginognin 89,0 mió. kr.

Partapeningin, ið er 40 milliónir, eigur Pf. BankNordik.

Einki vinningsbýtið verður latið til móðurfelagið, BankNordik fyri árið 2011.

Trygd hevur gjøgnum árið 2011 latið inn uppgerðir um innanhýsis solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um innanhýsis solvens, ið er neyðugur fyri virksemi felagsins, er munandi lægri enn bókaða eginogn felagsins. Kravið í 2011 var 42,2 mio. kr, meðan bókaða eginognin var 89,0 mio. kr.

Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður.

## Útlit fyri árið 2012

Leiðslan væntar, at umsetningurin verður toluliga støðugur í 2012.

Harða kappingin millum tryggingarfeløgini um prís og treytir fer helst at halda fram.

Íløgurnar, ið móðurfelagið hevur gjørt í Amagerbanken og LÍV, fara valla at ávirka tað, ið Trygd væntar fyri árið 2012. Tó verður hildið, at samstarvið millum systurfeløgini fer at styrkja yrkisliga grundarlagið undir tryggingarvirkseminum hjá Trygd.

Inntøkurnar væntast at verða eitt sindur hægri í 2012, og felagið væntar, at ætlaða nettoúrslitið fyri alt árið 2012 verður umleið 10-14 mió. kr.

At eginogn felagsins 31. desember 2011 var 89,0 mió. kr. verður hildið at vera nøktandi fyri virksemið hjá Trygd í 2011.

## Aðrar upplýsingar

Tað eru ikki farnar fram hendingar síðan 31. desember 2011, sum hava avgerandi ávirkan á felagsins rakstur og fíggjarligu støðu.

# Management's Report 2011

Trygd is a non-life insurance company, operating on the Faroe Islands.

The company provides a broad portfolio of insurance products to households, individuals and commercial customers. The main exception is insurance of bigger vessels, which was abandoned in January of 2009.

2011 was an unusual year for Trygd and the result is as a whole deemed unsatisfactory.

There were significantly more claims in 2011 compared to 2010 because of the unusually rough winter storms. This is also true of claims expenses, which also were higher in 2011 than in 2010.

Despite a sound first nine months of 2011, claims have been higher than expected and unlike the two previous years, many and large claims have marked the year 2011.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 4.6m in 2011 compared to DKK 20.4m in 2010.

The profit after tax was DKK 3.7m in 2011 compared to DKK 16.8m in 2010.

Gross premium written fell by DKK 0.3m in 2011 to a total of DKK 85.8m. The drop is around 0.4 %. The decline derived mainly from decreased motor premiums. Premium income net of reinsurance decreased by DKK 1.3m, a 1.6 % drop compared to the same period in 2010.

The 2011 claims expenses are based on three sound quarters and a very poor fourth quarter from October to December.

The main reasons were the storms of 24 November and 25 December, which had their impact. The storm of 24 November was the worst storm the Faroes had seen since 1988, and was a main contributor to Trygd's poor result.

As of 31.12.2011 total claims expenses stemming from the 24 November storm were registered as DKK 19.6m. The number may still climb somewhat, as the damages are still being repaired.

Additionally, the claims expenses for the storm on Christmas Day are registered as DKK 3.8m at year-end.

Claims, net of reinsurance, totalled DKK 62.7m in 2011 compared to DKK 47.1m in 2010.

The 2011 claims ratio of 78.4 is considered to be too high. The 2010 claims ratio was 59.4.

Provisions for claims, net of reinsurance, amounted to DKK 58.4m at the end of 2011, which was an increase of DKK 30.3m more than in 2010 when provisions for claims, net of reinsurance, amounted to DKK 28.1m.

The increase is a direct result of the winter storms.

The technical result was DKK 1.8m in 2011 compared to DKK 17.2m in 2010.

Thus the technical result was significantly worse than in the previous year, but keeping in mind the extent of the damages and the many and large claims expenses caused by the winter storms, the company is pleased that it has managed to end the financial year with a profit.



2011 brought about changes in Trygd's management. Jean Djurhuus, who had been managing director since February of 2008 resigned from the company on 1 June 2011. Janus Thomsen, who had been head of marketing and sales, was appointed managing director ad interim. This situation has remained unchanged.

In 2011 Trygd began the preliminary work of implementing a new IT system. This work will continue in 2012 and 2013 and will lead to additional costs expenses.

Because the work on the IT project was delayed somewhat, operating costs decreased compared to last year.

Operating costs are considered satisfactory.

In spring of 2011 the parent company, BankNordik, acquired the healthy parts of Amagerbanken and thereby expanded its banking activities in Denmark. The acquisition of Amagerbanken has had no significant effect on Trygd in the time period.

In early summer BankNordik also acquired half of life insurance company LÍV.

The acquisition of half of LÍV has not had any significant effect on Trygd either.

Trygd's reinsurance program for 2011 is largely unchanged from 2010.

Trygd has retained a relatively high retention rate.
Income from investment assets amounted to DKK 3.7m in 201 compared to DKK 4.0m in 2009.

Lower interest rate levels are the main reason for the drop in financial income. The company pursues a prudent investment policy, according to which most of the investable funds are placed in bonds and the rest as fixed-term deposits. The company held no equity investments in 2011.

Tax on income for the year 2011 has been calculated at DKK 0.8m.

Management does not consider the result satisfactory.

## The market

The fierce competition among the providers also left its mark on 2011. Both in terms of coverage and prices.

Trygd achieved a moderate improvement in sales to private customers in terms of amount of premiums. However, the pressure on insurance costs means that this increase is not visible in premium income.

Trygd is dedicated to developing the commercial market and steps have been taken in this regard in 2011. The company places a lot of effort in developing relations with current customers in addition to attracting new customers.

The company aims to grow this market in the years ahead.

Sales of cars and single-family homes in the Faroe Islands are still at a low level compared with previous years.

The increase is small and cautious despite some optimism ahead.

New car sales reached a low point in 2011 as has been the case in the last two years. The limited sale of cars restricts business opportunities within motor insurance because it is in the purchase moment that the customer considers where to insure the car. Moreover, old cars are getting older and are transferred from all-risk insurance to merely hull insurance. This leads to lower income to the company.

Nevertheless, Trygd's portfolio of motor insurance policies has been positive in 2011. Much has happened on the non-life insurance market on the Faroes the last few years.

As for competition as a whole, today Danish and Icelandic insurance companies are free to operate on the Faroese market, while insurance brokers are also allowed to operate on the Faroes.

Having a greater supply in the market benefits competition and eventually the customers.

Despite the fact that the Faroese market has seen no Danish insurance companies in 2011, Icelandic insurance companies have made their entry on selected areas within commercial insurance through an insurance broker on the Faroes.

## Company developments

Trygd works continuously to develop and maintain a competitive insurance business. The company focuses on maintaining costs at a reasonable level and on keeping the qualifications of its employees up to date, enabling them to advise and serve the customers in the best possible way in order to generate solid and healthy growth rates for the company. An important aspect of our concept is to maintain our customers' trust and ensure healthy competition in the non-life insurance market without compromising quality.

The management believes that Trygd holds a sound business position in the Faroese insurance market.

In 2011, Trygd had an average of 24 employees (full-time equivalent), against a similar 24 in 20010.

## Risk Management

Risk management is a fundamental part of Trygd's business. When customers choose to insure themselves at Trygd, they do so in the belief that Trygd manages its risks in a way that the company at all times can meet its obligations.

Trygd´s Board of Directors must ensure that the company has an adequate capital base and have internal procedures for risk measurement and risk management for ongoing assessment and maintenance of a capital base of a size and distribution, which is adequate to cover its risks.

To meet these demands there will be a continual updating of company policies and procedures, combined with calculations that derive individual capital needs.

Trygd's risk is based on a number of policies, procedures and risk assessments, which is regularly reviewed and approved by the Board.

## Insurance risk

Trygd monitors the progress of the drawn assurances and assess them according to the established acceptance, reinsurance and capital policy.

Besides the continuous monitoring of profitability for written risks, there is an on-going assessment of the provision to cover not yet incurred events already covered by insurance contracts. It also includes an assessment of credit risk associated with outstanding premiums. The technical provisions to cover future payments for claims incurred, aside from an individual assessment of the known injuries supplemented by statistical analysis.

Trygd's reinsurance policy is translated into a reinsurance program that ensures that major natural events and major individual claims do not threaten Trygd to comply with its obligations.

To reduce possible credit risk, Trygd only enters into reinsurance agreements with strong reinsurers with a good financial standing or good international rating.

## Market risk

Trygd has a prudent investment policy.

A significant part of Trygd's assets consist of governmental bonds and mortgage bonds on the Danish financial market, and the rest is in bank deposits.

The company has no investments in stocks and shares.

Trygd has no currency risk.

## Strategic risk

The strategic risk is managed by the Board regularly provides a framework for management's strategic efforts and by continuously monitoring the strategy.
The strategic management includes continuous monitoring of the outside world, competition and legislation.

## Operational risk

Operational risk is the risk of direct or indirect loss resulting from inadequate or failed internal processes, people, systems or external events. Risks associated with these conditions also include the company's solvency statement.

Trygd closely follows established policies and guidelines, including the IT- contingency plan.

Uncertainty regarding recognition and measurement consist of following measures:
The estimation of reserves for insurance contracts, the company's most critical accounting estimates, as many uncertainties associated with provisioning for these.

Claims outstanding, estimated using individual case-by-case evaluations and statistical projections of the claims and administration of compensation.

Projections are based on Trygd´s experience regarding the development history, payment patterns, time to reach the damages reported, the duration of the damage assessment process and other factors that could affect the future development of the liability.

The provision for outstanding claims includes an estimated liability for damages incurred but not yet reported ("IBNR-provisions").

Provisions for claims also include direct and indirect claims handling costs or expenses to calculate the damages incurred as a result of events that have occurred up to balance sheet date, even if they are not reported to the company.

## The company's capital structure and solvency

Shareholders' equity amounted to DKK 89.0m at 31 December 2011.

The share capital of DKK 40m is wholly owned by Pf. BankNordik.

There will be no pay-out to the parent company BankNordik for the year 2011.

Trygd has submitted reports on its individual solvency ratio to Tryggingareftirlitið throughout 2011. The calculated individual solvency required for the company's current operations is substantially lower than the company's shareholders equity. The 2011 requirement was DKK 42.2m while the shareholder's equity was DKK 89.0m.

This confirms the company's relatively strong financial position.

## Outlook for 2011

Management expects relatively stable revenue flows in 2012.

The fierce competition among existing providers is expected to persist.

The parent company's investment in Amagerbanken and LÍV is not expected to influence Trygd's outlook for the year 2012. On the other hand, collaboration between the sister subsidiaries is expected to enhance the professional platform for Trygd's insurance operations.

Earnings are expected to be on a somewhat higher level in 2012, and the company expects a full-year net profit of around DKK 10 – 14m for 2012.

Equity of DKK 89.0m at 31 December 2011 is considered satisfactory in view of Trygd's operations in 2011.

## Other information

No events have occurred since 31 December 2011 which are of material significance to the company's financial or operating position.



# Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Ársroknskapurin hjá Trygd er gjørdur sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og er tískil óbroyttur í mun til undanfarna ár.

## Tryggingargjøld

Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað, soleiðis at inntøkur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

## Latin endurtryggingargjøld

Tryggingargjøld til endurtryggingarfeløg verða tíðaravmarkað, soleiðis at útreiðslur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

## Endurgjøld/ endurgjaldsburturleggingar

Endurgjaldsburturleggingar og áogn av skaðum, eru uppgjørd eftir einsæris metingum av hvørjum skaða sær, sum ikki er endaliga uppgjørdur. Íroknað endurgjaldsburturleggingar, er eisini ein eykaupphædd á 5% fyri hendar, men ikki fráboðaðar skaðar, og eitt eyka fríhald á 10% til óvæntaðar skaðaútreiðslur.

## Tryggingarteknisk renta

Tryggingartekniska rentan er roknað sum 1,46% av miðalstøddini á tryggingarburturleggingum fyri egna rokning.

## Endurtryggingarfulnaður

Gjøld frá endurtryggjaranum viðvíkjandi meldaðum skaðum verða tíðaravmarkað, soleiðis at hesi verða tikin við í tann mun, tey eru tengd at roknskaparárinum.

## Fastar ognir

P/F Trygd eigur eini tvíhús, hvørs virði er ásett til marknarvirði.

## Lánsbrøv

Lánsbrævagoymsla felagsins er virðissett sambært almennum kursum við árslok.

## Innbúgv og rakstrartól

Innbúgv og rakstrartól felagsins eru bókað til keypsprís, frádrigið av- og niðurskrivingar. Ognirnar verða avskrivaðar liniert, grundað á ætlaða nýtslutíð eftir 3 til 5 ár. Útveganir av rakstrargøgnum fyri undir 20.000 kr. verða útreiðsluførdar. Ritbúnaður (software) verður útreiðsluførdur í útveganarárinum.

## Skattur

Skattur er samansettur av skatti av skattsskyldugu inntøkuni fyri árið og javning av útsettum skatti, umframt javnan av skatti undanfarin ár. Skatturin av skattskyldugu inntøkuni í árinum verður útreiðsluførdur í rakstrarúrslitinum við 18%. Útsetti skatturin verður avsettur við 18% av muninum millum roknskaparlig og skattlig virði á ogn og skuld.

## Handlar innan samtakið

Við handli millum feløg í samtakinum og millum samstarvsfyritøkur, eins og tá hesi gera arbeiðið hvørt fyri annað, verður avroknað sambært marknaðartreytum ella á einum útreiðslunøktandi grundarlagi.

## Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desembur 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

## Gongdin seinastu 5 árini

Sambært § 147 stk. 3 í roknskaparkunngerðini fevnir 5 árs yvirlitið um 2009, 2010 og 2011. Hetta kemst av at eldru tølini ikki eru beinleiðis samanberandi.

# Accounting policies

## General information

The annual financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies and is thus unchanged compared to last year.

## Premiums

The premium income is accrued to match the share in the financial year.

## Reinsurance premiums ceded

Premiums to reinsurers are accrued so that the expense matches the share in the financial year.

## Claims/provisions for claims

Provisions for claims and receivables related to claims are calculated according to an individual assessment of each unsettled claim. Provisions for claims also include a 5% reserve for incurred but not yet reported claims and an extra buffer reserve of 10% for unforeseen claims expenses.

## Technical interest

The technical interest is calculated as 1.46% of the average technical provisions net of reinsurance.

## Reinsurance recoveries

The reinsurers' share of reported claims is accrued so that the income matches the share in the financial year.

## Buildings

Trygd owns one joined terrace house, which is measured at market value.

## Securities

The company's bond portfolio is measured at the most recent officially listed price.

## Fittings, IT systems, motorcars, etc.

Fittings, IT systems and the company's motorcars are measured at cost less depreciation and impairment. The assets are depreciated using the straight-line method based on their expected useful lives of between 3 and 5 years.

Operating equipment with a cost of less than DKK 20 thousand is written off in the year of acquisition.

Software is written off in the year of acquisition.

## Tax

The tax charge for the year comprises tax on the taxable income for the year and changes in deferred tax. Tax on the taxable income for the year is charged against the income statement at a rate of 18%. Deferred tax is measured using the balance sheet liability method at a rate of 18% on temporary differences between the carrying amount and tax base of assets and liabilities.

## Intra-group transactions

Transactions between the Group's companies and associates are settled on an arm's length or on a cost recovery basis.

# Key figures

The key figures have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies.

# 5-year financial highlights

According to §147 stk. 3 in the executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies, the 5-year financial highlights include 2009, 2010 and 2011. This is because it is not possible to compare previous figures.

# Nevnd og stjórn / Board of Directors and Management

Onnur leiðslustørv í føroyskum partafeløgum hjá nevnd og stjórn í P/F Trygd Tryggingarfelag.
Other management duties in Faroese registred companies of the directorship in P/F Trygd Tryggingarfelag.

Nevndin / Board of directors:

| | |
|---|---|
| **Janus Petersen** | Forstjóri BankNordik / CEO BankNordik<br>Elektron, næstformaður / Vice chairman of the board<br>Arbeiðsgevarafelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum, formaður / Chairman of the board<br>Felagið Peningastovnar, nevndarlimur / Member of the board |
| **Christian Andreasen** | P/F SMS, Nevndarformaður / Chairman of the board<br>P/F J & K Petersen, Nevndarformaður / Chairman of the board<br>P/F Hvanndalur, Nevndarformaður / Chairman of the board<br>Sp/F Íbúðir undir Gráasteini, Stjóri / Managing Director<br>Sp/F Christian Andreasen, Stjóri / Managing Director<br>P/F Property Bonds, stjóri og nevndarlimur / CEO and Member of the board<br>Fótbóltssamband Føroya, forseti / President |
| **Tummas Hanus Dam** | Grunnur H.N. Jacobsen, nevndarlimur / Board member<br>P/F H.N. Jacobsens Bókahandil, Nevndarformaður / Chairman of the board<br>P/F Fóm, Stjóri og nevndarlimur / Managing director and board member<br>P/F Thomas Dam Ítróttur, Stjóri og nevndarlimur /<br>Managing director and board member<br>Sp/F 23. Oktober 1998, Stjóri / Managing Director |
| **Jens Erik Christensen** | P/F BankNordik, næstformaður í nevndini / Vice chairman of the board |
| **Niels Juul Andersen** | Hevur ikki onnur leiðslustørv í føroyskum partafeløgum /<br>Has no other management role in faroese registred companies |

Stjórn/Excecutive management:

| | |
|---|---|
| **Janus Thomsen** | Hevur ikki onnur leiðslustørv í føroyskum partafeløgum /<br>Has no other management role in faroese registred companies |


OFF

# Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

**Høvuðstøl / Key figures**

| DKK 1.000 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 86.082 | 87.213 | 89.918 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -68.091 | -46.729 | -42.069 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging / Total insurance operating expenses | -17.716 | -18.972 | -17.950 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | 598 | -5.065 | -5.712 |
